# Almenn revsiábyrgd skal staðfestast

*Landsstýrið vil tryggja, at eisini almennir arbeiðsgevarar verða revsaðir, tá teir bróta lógina. Tað almenna má ganga undan tá tað snýr seg um rættartrygdina, staðfestir landsstýrismaðurin í lógarmálum.*



*Almennir arbeiðsgevarar skulu halda lógina eins og privatir arbeiðsgevarar. Tað heldur Høgni Hoydal, landsstýrismaður, sum nú reisir málið um revsiábyrgdina hjá almennum stovnum.*
**Mynd: Skýrák**

DÁNJAL HØJGAARD

– Hatta fara vit at hyggja eftir beinanvegin. Vit skulu hava eina klokkuklára staðfesting av hvør ið hevur ábyrgdina av at lógirnar verða hildnar - eisini innan almennar stovnar.

Soleiðis ljóða greiðu boðini frá Høgna Hoydal, landsstýrismanni, eftir at Sosialurin leygardagin staðfesti, at almennir og privatir arbeiðsgevarar ikki eru líka fyri lógini, tá til stykkis kemur.

Støðan er tann, at fútin fær einki gjørt við almennar stovnar, sum bróta lógina, tí hann fær ikki staðfest revsiábyrgdina.

Arbeiðseftirlitið fekk í fjør fimm mál sendandi aftur frá fútanum, við tí stempli, at fútin ikki fekk ábyrgda ein almennan stovn. Sambært Jens Severinsen, virkandi fúta, er trupulleikin við lógini um arbeiðaravernd helst galdandi fyri »eina ørgrynnu« av øðrum lógum - eitt nú lógum, sum Brunaumsjónin og Heilsufrøðiliga Starvsstovnan eru sett at umsita.

### Skuldu gingið undan

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum, sigur, at tað kann slett ikki góðtakast, at almennir stovnar sleppa undan lógini.

– Tað er ein stórur trupulleiki, um tú ikki kanst staðfesta ábyrgdina. Hetta er nakað, sum vit mugu gera nakað við beinanvegin. Almennir stovnar mugu ganga undan, tá tað snýr seg um rættartrygd og at áseta greiðar linjur fyri ábyrgd, sigur Høgni Hoydal.

### Má kannast

Sambært virkandi fútanum eru tvær orsøkir til, at politiið einki fær gjørt við almennar stovnar, sum bróta lógina.

Revsilógin, sum er galdandi í Føroyum er ongantíð dagførd við ta donsku, sum staðfestir revsiábyrgdina hjá almennum stovnum. Harafturat vanta tær einstøku føroysku lógirnar í mongum førum eisini eina slíka staðfesting.

– Tað er møguligt, at her er okkurt sum má setast í verk. Men tað fái eg ikki sagt nakað ítøkiligt um, fyrr enn eg havi tosað við fakfólk um málið, sigur Høgni Hoydal.

### Vanligt seinføri

Landsstýrismaðurin sigur, at hann vil kanna, hví ásetingin í donsku revsilógini, sum staðfestir, hvør ið skal ábyrgdast á almennum stovnum enn ikki er komin við í føroysku revsilógina. Hann vísir tó á, at tað er ein generellur trupulleiki, at tað tekur ov langa tíð, at dagføra ríkislógir.

– Orsøkin til at ríkislógir ikki verða dagførdar í Føroyum er at tað er ein øgiliga seiglig mannagongd, har tað er øgiliga ringt at staðfesta hvør ið hevur skyldu at taka initiativið, sigur Høgni Hoydal.

## Kært til landsstýrið

Arbeiðseftirlitið hevur fleiri ferðir gjørt Vinnumálastýrið vart við trupulleikan, at tað ikki ber til at revsa almennar stovnar, sum bróta lógina um arbeiðaravernd.

Hetta sigur Eli Davidsen, stjóri á Arbeiðseftirlitinum.

Arbeiðseftirlitið hevur skotið upp, at seta í verk lóg um arbeiðsumhvørvi í Føroyum. Sambært stjóranum hevði hendan lóg loyst trupulleikan við revsiábyrgdini hjá almennum stovnum.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum vil kanna málið nærri.

– Einki er komið á borðið her hjá okkum á lógardeildini. Kanska er málið reist mótvegis teirra egna landsstýrismanni, og tað kann eg so fara og kanna.

– Tað er púra greitt at støðan er ikki haldgóð og okkurt má gerast, sigur Høgni Hoydal.

# Schengen-samstarvið seinkað

*Nú er greitt, at felags evropeiska pass- og politisamstarvið, Schengen verður ikki sett í verk í Føroyum fyrr enn um eitt gott ár.*

DÁNJAL HØJGAARD

Tað var í 1997 at Danmark staðfesti Schengen-sáttmálan. Hóast málið ikki fekk nakra politiska viðgerð í Føroyum, so varð longu tá avrátt, at samstarvið eisini skuldi fevna um Føroyar, sum part av danska ríkinum.

Upprunaliga var ætlanin, at samstarvið skuldi fara at virka í danska ríkinum í 2000. Nú verður tað kortini ikki fyrr enn 25. mars 2001.

Samstundis sum samstarvið fer at virka í Danmark koma Svøríki og Finnland eisini uppí.

### Pass-og politisamstarv

Schengen er eitt samstarv millum fleiri evropeisk lond, og sum hevur virkað nøkur ár á evropeiska meginlandinum.

Schengen-londini skulu samstarva um passeftirlitið mørkunum mótvegis 3. londum. Samstundis verður eitt tætt politisamstarv tvørturum Schengen-mørkini.

Ein krumtappur í skipanini er tann sonevnda SIS-skráin. Schengen Information System er ein stór online politiskrá. Eitt slag av felags evropeiskum svartalista, sum m.a. vísir hvør, ið er óynsktur og eftirlýstur í Schengen-økinum.

Ætlanin er, at SIS-teldur skulu standa á farstøðini í Havn og á flogvøllinum í Vágum.



*Schengen-samstarvið merkir, at Føroyar verða ein av ytstu skansunum í einum stórum millumlanda politi- og passsamstarvi.*



# Krøvini størri enn viljin at gjalda

*Tað, at flotin hjá Strandferðsluni er so gamal, setur krøv til játtanina hjá stovninum. Trygdarkrøvini skulu lúkast til eina og hvørja tíð, ella er vandi fyri, at skipið tað snýr seg um verður lagt. Kortini heldur leiðslan á stovninum ikki, at politikarar skilja hesa støðu. – Teir krevja tænastur, men gloyma at geva okkum neyðugu játtanina, sigur Reidar Nónfjall, stjóri*



*Reidar Nónfjall, stjóri, Helgi Nielsen, roknskaparleiðari, og Magnus Magnussen, tekniskur leiðari, við »arbeiðsøkinum« í bakgrundini*
**Mynd:Jens Kristian Vang**

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað mann ikki vera eitt mansbarn í Føroyum, sum ikki hevur hoyrt, at skipini í flotanum hjá Strandferðsluni eru gomul og slitin.

Barskor er ellisforseti - um tey sjeyti - meðan Tróndur er farin um tey fýrati. Hetta hugsa vit ikki so nógv um, tí hesi skipini hava altíð verið her, men tá tosið fellur á Dúgvuna, Smyril og Ternuna, so hava vit kanska lyndið til at gera tey yngri enn tey eru, tí tey eru komin so seint til landið, men so er kortini ikki. Okkurt teirra er farið um tey tríati, meðan annað sníkir seg skjótt upp ímóti.

Og tað at flotin er so gamal, sum hann er, merkist eisini á trygdarkrøvunum.

Tey gerast alsamt strangari, og sum Reidar Nónfjall sigur:

– Trygdarkrøvini er ikki nakað vit samráðast við trygdarmyndugleikarnar um.

Hetta skal skiljast soleiðis, at verður stovninum álagt at gera broytingar umborð á skipi, so verður tað gjørt - uttan himpr.

– Eingin skal seta spurnartekin við trygdina, sigur stjórin avgjørdur.

### Kann leggja skipini

Veruleikin er nevniliga tann, at verða krøvini frá trygdarmyndugleikunum ikki fylgd, so kann tað hava við sær at skip verður lagt.

Tað er at leggja skipini, og hóast tað merkir, at stovnurin tá ikki livir upp til vilja løgtingsins, so er hetta ein møguleiki, sum stjórin á Strandferðsluni er til reiðar at brúka, um á skuldi staðið.

– Eg havi reiðaraábyrgd og tað merkir, at eg kann leggja skip, um so er, at tey ikki liva upp til krøvini, sigur hann.

Um tað kemur so vítt er ivasamt, men tað er ein møguleiki, sum strandferðslustjórin má hava í huganum, nú hann, saman við restini av leiðsluni á stovninum er farin at hyggja at hvussu stovnurin kann liva upp til treytirnar sum tingið setti teimum, tá fíggjarlógin varð samtykt.

Tá bað stovnurin um eina eykajáttan upp á 10 mió. krónur, men fekk bert játtað tríggjar, sum svaraði til tann fyrsta ársfjórðingin. Saman við teirri meirjáttanini var tann treyt sett, at ferðaseðlaprísirnir skuldu ikki hækkast.

### Krevja meir enn teir vilja gjalda

Sum støðan er hjá Strandferðsluni í løtuni, so hevur stovnurin fingið eina játtan upp á góðar 48 mió. krónur.

Stovnurin bað um 55 mió. krónur og tískil mangla um 7 mió. krónur í fyri at Strandferðslan fíggjarliga kann mala alt árið 2000.

Tá løgtingið samtykti fíggjarlógina fekk stovnurin álagt at gera eina ætlan um hvussu hesar 7 mió. krónurnar kundu finnast innanveggja - og framvegis uttan at tað skuldi síggjast aftur á tænastustøðinum.

Hetta er ikki bara sum at siga tað, men kortini er leiðslan á Strandferðsluni farin undir at gera eina langtíðarætlan, sum skal vísa hvussu alt hongur saman á stovninum, greiðir Reidar frá.

### Møguleikarnir fáir

Men tá støða skal takast til, hvussu stovnurin skal finna fram til tær 7 milliónirnar, sum resta í, eru møguleikarnir ikki so nógvir.

– Nei, tá kann tað gerast rættiliga trupult sigur Reidar.

– »Trupulleikin« er, at tingið hevur sett sum treyt, at tænastustøðið ikki skal lækkað, og tað ger, at vit ikki kunnu minkað um túratalið uttan at tænastustøðið gerst verri, vit samráðast ikki um trygdarviðurskiftini og manningartalið er ikki nakað, sum vit kunnu gera nakað við. Har eru eisini ávísar spælireglur, sum vit skulu fylgja, so veruleikin er, at tað er torført at fáa eygað á nakrar sjálvsagdar sparingarmøguleikar, sigur Reidar Nónfjall, sum kortini ikki hevur mist mótið um at tað skal fara at eydnast á ein ella annan hátt.

Hann greiðir frá, at stovnurin hevur eitt sera gott samstarv við Vinnumálastýrið, sum í veruleikanum er teirra »nevnd« og í felag fer tað at eydnast at finna fram til eina loysn, væntar hann.

– Men verður fíggjarligi karmurin óbroyttur, kann endin vera, at trívast má til uppsagnir, at túrar mugu skerast burtur ella at skip vera løgd, sigur Reidar.

Tá vit spyrja um tað ikki er ein møguleiki, at privatisera ella útlisitera ein part av farleiðunum hjá Strandferðsluni, sigur stjórin, at tað hevur leiðslan hugt eitt sindur at, men tað er ikki nakað, sum verður gjørt í eini handavend.

– Útlisiteringar eru ikki fremmandar her í húsinum, tí vit hava útlisitera ein stóran part av bygdaleiðunum, men tað merkir ikki, at vit sleppa undan útreiðslum. Og at tosa um beinleiðis privatisering ber heldur ikki til uttan at hava løgtingið við, sigur hann at enda.

Hvussu leikur fer í hesum málið verður spennandi at síggja. Málið skal fyri landsstýrið tá frágreiðingin frá stovninum er liðug

## – SL má fáa størri játtan

*Finnbogi Arge, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur at hann skilir trupulleikan hjá SL, við tað at krøvini hjá tinginum um at sjey milliónir skulu finnast innanveggja*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað er Finnbogi Arge, landsstýrismaður, sum hevur ábyrgdina av Strandferðsluni, og hann dugir væl at síggja trupulleikan, sum stovnurin er í.

– Vit gjørdu beinanvegin tingið vart við, at fekk stovnurin ikki størri játtan ella slapp stovnurin ikki at hækkað prísirnar, so fór at vera trupult at fáa raksturin at hanga saman.

Tað sigur Finnbogi í sambandi við, at strandferðslan skal finna um sjey milliónir krónur uttan at tað sæst aftur á tænastustøðinum.

Hann skilir eisini, at støðan hjá stovninum er trupul at hava við at gera, og tað skal serliga síggjast frá teirri síðuni, at tað eru ikki so nógv, sum er til at taka um so er, at stovnurin ikki fær størri játtan.

– Ein av trupulleikunum er, at ein lutfalsliga stórur partur av meirútreiðslunum fellur í fyrsta ársfjórðingi. Ein annar er, at vit eru farin undir árið, og tað merkir, at skulu sparingar gerast á stovninum, so koma tær at gerast so mikið meira ógvusligar. Tíðarskeiðið er jú styttri at spara í, sigur Finnbogi Arge.

Landsstýrismaðurin skilir eisini støðuna, sum leiðslan á stovninum hevur tikið um, at tað ikki kemur upp á tal at seta hol á kassakredittin.

– Stovnsleiðslan vil ikki brúka peningin uttan at játtanin fyriliggur, og tað er ein skilagóð støða at hava, sigur landsstýrismaðurin.

Støðan hjá SL er kortini ikki loyst, og í løtuni ber ikki til at siga, nær ein loysn fyriliggur.

Í fyrsta umfari skal málið fyri landsstýrisfund og har kemur tað, so skjótt sum frágreiðingin frá stovninum fyriliggur.

– Og tað vænti eg verður fyrsta dagin, sigur Finnbogi Arge at enda.



*– Tingið fekk beinanvegin at vita, at varð játtanin ikki hækkað, so fær tað avleiðingarfyri virksemi hjá Strandferðsluni, sigur Finnbogi Arge, landsstýrismaður í vinnumálum*
**savnsmynd**